

SOZOPREPRESS

# P/F Fiskaaling søkir granskara

## til verkætlan innan aling á opnum havi

Fiskaaling er farið í gongd við verkætlan innan **Aling á opnum havi.** Verkætlanin er partur av átakinum nýggj aliøki í vakstrarpakkanum hjá Vinnumálaráðnum (www.vmr.fo). Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara til mátiarbeiði, teldumodelering og dimensioneringsarbeiði.

**Ynskiligir førleikar**

- viðkomandi útbúgving, verkfrøðingur ella líknandi
- royndir frá teldumodelering, serliga FEA-modelering
- royndir við fysiskari modelering og signal analysu
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og Náttúruvísindadeildini umframt at arbeitt verður saman við granskarum úti í heimi.

Høvuðsaktiviteturin verður at gera model arbeiði í samband við at útgerð til aling á opnum havi skal mennast, og at taka lut í mátiarbeiðinum í hesum sambandi. Model arbeiði umfatar FEA modelering av rørslum í samband við streym- og alduávirkan umframt design og dimensionering av fortoyningum, ringum og nótum. Harafturat skal støddarskalerað model gerast og roynast í royndarbrunni. Neyðug upplæring verður veitt til tann partin av arbeiðinum har umsøkjarin ikki hevur førleikar.

Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi umframt at partar av verkætlanini kunnu innganga í PhD-útbúgving.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tel 214787 ella Kristian Petersen á tel 548180.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir, FO-430 Hvalvík

ella
fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 7. mai 2010. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Fiskaaling**
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er 25, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo

# LEGA FYRI FÓLK VIÐ BREKI

## 29. apríl – 2. mai 2010




Sosialurin / KvR 34 18 00

**Verið hjartaliga vælkomin aftur í ár! Sigið øðrum frá og bjóðið teimum við!**

**Tilmelding á teldupost: brek@zarepta.fo ella við at ringja 288720 áðrenn 22. apríl.**

Ringið til ein av undirritaðu, um spurningar eru í sambandi við leguna.

**Norðoyggjar**
Jógvan Tróndheim, tlf. 456822 / 229070

**Suðuroy**
Majbritt West, tlf. 375284 / 575284

**Annars:**
Elisabeth Mortensen, tlf. 317244 / 517244
Samly Reinert, tlf. 318720 / 288720

**Kostnaður fyri leguna er:**
Børn 0 - 5 ár ......... kr. 100,-
Børn 6 - 14 ár ....... kr. 225,-
Vaksin.................... kr. 400,-
Foreldur við børnum í mesta lagi kr. 1.200,-

Zarepta hevur kontu í Føroya Banka: 6460-156.666.2

***Havið kvittan við vestur!***

Zarepta

Legan er ætlað øllum, ið hava brek, og familjum, stuðlum og starvsfólkum teirra. Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, verður millum annað: andakt, sangur, fyrilestrar, pallborð, samtalubólkar, kvøldsøga, tónleikur, leikvenjing, fimleikur, ríðing, svimjing, túrar, spæl úti og inni, ymisk ítriv, video, busstúrar, sansarúm og gallakvøld

# Kann eg gera mun?

## Hvussu skilja og hjálpa børnum, ungum og familjuni, tá ið rúsdrekka trupulleikar eru?

**31. mai 2010**

Skeið fyri fakfólk, við Birgit Trembacz, sálarfrøðingi og familjuterapeuti.

**Hesi evni verða viðgjørd:**

- Allýsing av hugtakinum stórnýtsla, at vera bundin av rúsdrekka, skaðilig nýtsla
- Tekin / eyðkenni hjá børnum og ungum, um rúsdrekka misnýtsla er í familjuni
- Tekin / eyðkenni hjá vaksnum og avvarðandi
- Broytingarteori og motivatiónsgreinan
- Hvussu hjálpa børnum og ungum
- Hvussu finna og / ella verða ein bøtandi vaksin
- Hvussu skulu vit vera yvir fyri foreldrunum / tann neyðuga samrøðan.

Skeiðið er á donskum / føroyskum og verður skipað sum tvívegissamskifti og bólkaarbeiði. Tú fært amboð og íblástur til, hvussu truplar støður / samrøður kunnu handfarast, tá ið rúsdrekka trupulleikar eru.

**Skeiðshaldari:** Birgit Trembacz, sálarfrøðingur og familjuterapeutur.
**Nær:** Mánadagin 31. mai. Byrjað verður kl. 08.30 við morgunbreyði. Skeiðið er liðugt kl. 16.00.
**Staður:** Í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í Tórshavn.
**Málbólkur:** Lærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, barnaverndartænastur, og onnur, sum arbeiða við børnum og / ella ungum.
**Kostnaður:** 1.990,-kr (íroknað kaffi/te, frukt, frokost og skeiðstilfar).
**Tilmelding:** Við telduposti á blakross@blakross.fo, ella á telefon 470700.
**Freist:** 17. mai 2010.

Nærri fæst at vita um skeiðið, við at venda sær til Jóngerð Nielsen, fyribyrgingarráðgeva, tel 59 95 30, ella á www.blakross.fo

Birgit er fødd í 1952. Hon er cand.psyk, rithøvundur og familjuterapeutur. Hon hevur seinastu 20 árini arbeitt við at hjálpa familjum og børnum, sum hava rúsdrekkamisnýtara tætt at sær. Saman við danska Sundhedsstyrelsen hevur Birgit seinastu 5 árini skipað fyri skeiðum, tvørfakligum og monofakligum. Á hesum skeiðum hevur serliga verið dentur lagdur á, hvussu lærarar, námsfrøðingar og starvsfólk í heilsuverkinum kunnu fáa eyga á og hjálpa børnum og ungum, sum eru uppvaksin í einum heimi við rúsdrekkatrupulleikum. Birgit hevur eisini skrivað nógv um evnið, greinar og tilsamans 5 bøkur. Les meir um Birgit á www.trembacz.dk

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS
www.blakross.fo

KREA · TEL 60 80 80





Sosialurin / KvR 34 18 00

Vit umvæla **ALLAR** skaðar og **ØLL** bilmerki

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/Hans Jacob Kollsker · Á Hjalla · Tel. 31 10 13
Fax 32 10 15 · www.kollsker.com

**STILLADS LEIGA**
*Absolutt bíligast!*



**GUTTORM MORTENSEN**
**www.stilladsleiga.com**
**TELEFON 25 11 60**

www.sosialurin.fo